## VIÐMERKINGAR

Blokkurin, banniorðið hjá føroyskum loysingarmonnum:

# Er hann nú so skaðiligur

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



Í avtaluni fyri blokkin fyri árini 2003-2006 er ríkisveitingin sett til 615,5 mio. kr.

Ríkisveitiningin er fastfryst og kann ikki prístalsviðgerast í hesum tíðarskeiði.

Hetta bleiv gjørt av flokkum, sum ongantíð ov skjótt vildu av við blokkin - hetta illavorðna barnið, sum eftir teirra tykki, var rótin til alt ilt í Føroyum.

Tó skal sigast at teir hava verið sera grammir at brúkt alt teir yvirhøvur kundu av hesum blokki.

Tey árini teir sótu við valdið fekk undanfarna samgonga heilar 5 milliardir - hvar eru størstiparturin av hesum peningi blivin av?

Stendur hann í útlendskum peningastovnum, sum Herman Oskarsson vil verða við??

Um so er, so manglar onkur konti á fíggjarlógini, tí upphæddin er ikki at finna har, og so lýgur onkur fyri onkrum.

Eg velji at trúgva, at Oskarsson tekur feil, ella kann hann kanska greiða okkum frá, hvar hendan »skaðiliga« upphæddin er at finna ella rættari sagt, hvat er hon brúkt til tá hon ikki er spard upp.

Allir búskaparfrøðingar vita, at um ikki blokkurin hevði verið - eisini undir fullveldissamgonguni, so hevði hallið á fíggjarlógini verið í milliardklassanum.

Undanfarna samgonga, sum vildi skapa ein sjálvberandi búskap, eru eftir mínum tykki ongantíð so langt frá hesum máli, sum júst nú, orsakað av teirra egna førda politikki seinastu 6 árini.

Teir oystu út av peningi til rakstur í so stóran mun tey árini teir sótu við valdið, at íløgurnar, sum annars skuldu verið tær sum sóust aftur á fíggjarlógini - svunnu nærmast burtur, í einum eksploderaðum rakstrarvøkstri, sum ikki hevur sæð sín líka.

Gamaní at stýra og brúka í ovurmát, tá væl stendur til og nokk er at taka av, men tá tað dró á luftina og dimmari skýggj aftur hómaðist í havsbrúnni, rýmdu teir av skútuni, sum rottur av søkkandi skipi.

Tá vit tosa um sjálvberandi búskap, so má málið verða, at vit mugu økja somikið nógv um inntøkur okkara, at vit harvið kunnu uppviga niðurskurðin í blokkinum.

Gera vit ikki tað - samstundis sum vit eisini eiga at tálma rakstrarútreiðslurnar mest møguligt, so fáa vit trupult við framyvir at verða eitt vælferðarsamfelag á sama støði, sum grannalond okkara.

Tað er og verður alneyðugt at tillaga kostnaðin av samfelagnum, neyðugt verður at finna útav, hvørjar tænastur vit hava ráð til og ikki í framtíðini, so einkult er tað.

Størsti trupulleikin liggur ikki í, hvørjar íløgur vit gera, men í tí alsamt vaksandi rakstarkostnaðinum

Fíggjarlógin eigur at vísa kósina framyvir - men ein framhaldandi bólgnandi almennur sektor, sum seinastu árini er vaksin nærmast ótálmað - er ikki mátin at blíva meiri sjálvbjargin uppá - um so er, so havi eg misskilt okkurt fundamentalt.

Sjálvandi skulu vit arbeiða fram ímóti verða sjálvbjargin innan ríkisfelagsskapin, tað gerst ikki yvir ein dag ella eitt ár, - men tað skal gerast við skili.

So hvørt vit økja okkara inntøkur meir enn vit økja útreiðslurnar á fíggjarlógini, ja so er møguligt at regulera ríkisveitingina - málið við ríkisveitingini er júst at varðveita áleið sama livistøði í øllum pørtum av ríkinum!

Ein kann undrast yvir, at fullveldissamgongan ikki megnaði at hava eitt hóskandi avlop á fíggjarlógini, tá blokkstuðulin enn var góðar 900 milliard um árið og bæði fólkakirkja, løgregla, dómsvald, sjóverja, flogvøllur o.a. enn ikki er yvirtikið.

Hvussu høvdu teir ætlað at fíggja framhaldandi niðurskurð í ríkisveitingini?

Hvussu ætlaðu teir at fíggja tær írestandi yvirtøkurnar, sum kostaðu 100 tals milliónir uttan at vælferðin verður skerd?

Hvørki fullveldisbúskaparfrøðingarnir ella gamla samgongan, komu nakrantíð við nøkrum ítøkiligum á borðið, sum greitt vísti, hvussu vælferðarsamfelagið Føroyar skuldi varðveitast.

Tað er óforsvarligt ikki at binda um heilan fingur meðan tíð er, tí um vit ikki kunnu antin spara rakstur ella økja um inntøkurnar, ja so enda vit í einum stórum trupulleika innan ikki langa tíð.

Um ikki laksaprísirnir økjast innan stutta tíð, so er alivinnan í stórum vanda fyri at fara heilt fyri bakka .

Somuleiðis eru tekin um, at fiskivinnan ikki kemur at hava somu høgu prísir sum hava verið - teir eru kanska blivnir meira »normalir« aftur, so vit mugu royna at verða realistisk og ikki droyma, tí veruleikin er nú einaferð dagurin ídag, ímorgin og næstu árini og tað er honum vit skulu liva við.

Tað at blokkurin er niðurskorin so ógvusligt kemur at geva okkum trupulleikar, teir merkja vit nú í inntøkugrundarlagið er viknað, nú síggja vit eisini, at tann einasta støðuga »fruminntøkan« veruliga er ríkisveitingin.

Eftir míni metan so er alt ov nógv skorið av blokkinum í einum, tað átti verið »eksperimentarað« við minni upphædd, ongin ivi um tað.

Vit mugu hava í huga, at tað at blokkurin er fastfrystur ger bara blokkin til minni part av samlaða búskapinum - um búskapurin heldur fram við at vaksa.

Um búskapargongdin vendir, so verður ein fastfrystur blokkstuðul ein alsamt størri partur av føroyska búskapinum.

Fyri at venda aftur til støðuna sum er, so er lítið at ivast í,- at minkast má um almenna sektorin.

Tann størsti vandin í stóru økingini í rakstrinum er, at sera trupult er at skera hann niður aftur og tí má størsta skynsemi vísast á øllum økjum.

Samgongan eigur at ganga á odda sum eitt gott fyridømi við at rationalisera/effektivisera og harvið eisini spara innanveggja allarfyrst.

Vit mugu eisini gera alt sum stendur í okkara makt fyri at fremja íløguhugin í vinnuni og royna at skapa karmar fyri verandi vinnu og nýggjum vinnum, sum føra inntøkuvøkstur við sær, tað er hóast alt hon sum leggur lunnarnir undir restina av samfelagnum - cirkulin byrja við vinnuni.




# Alfred Olsen má taka orðini aftur

**Høgni Hoydal**



Alfred Olsen, næstformaður Sambands-flok-sins, hevur nú sjálvur fimti ella sætti, limað seg inn í tað herliðið, sum seinastu vikurnar hevur skotið eftir øllum, ið rørir seg viðvíkjandi blokk-stuðli og upplýsing um búskaparligu viður-skiftini í tí sonevnda ríkis-felagsskapinum.

Alfred Olsen leggur undirritaða rong orð í munnin og sigur, at sjómansskatturin hevur verið viðgjørdur á ráðstevnuni um blokkstuðulin á Christiansborg.

Tað er ósatt. Ikki eitt orð varð nevnt um sjómansskatt á ráðstevnuni. Tað kann prógvast, tí alt er tikið upp á band.

Síðani sigur Alfred, at undirritaði skal hava sagt við Berlingske Tidende, at sjómansskatturin skal takast av, tí blokkstuðulin skal minkast.

Tað er eisini ósatt. Eg havi tvørturímóti sagt hetta við Berlingske Tidendende:

"Han (Høgni Hoydal) ser dog ingen sammenhæng mellem fiskernes høje lønninger og det danske bloktilskud.

»Fiskerne er dem, der tjener eksportindtægter hjem til Færøerne,« påpeger han."

Tá ið Alfred Olsen soleiðis hevur lagt eftir undirritaða og Tjóðveldisflokkinum av órøttum og við ósannindum, so rokni eg við, at hann er so mikið at sær komin, at hann rættar síni mistøk.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Heðin Hansen 60 ár



Í dag, 9. juni, fyllir Heðin Hansen í Kollafirði 60 ár.

Heðin vaks upp í Sundunum í Kollafirði, foreldrini vóru: Dánial Fr. Hansen í Sundunum og Elsebeth Katrina Johansen úr Hvalvík.

Heðin fór heilt ungur til skips, bert 13 ára gamal, við "Poseidon" í 1957. Hann kom heim aftur at fermast, og í 1958 fór hann við "Tinganes" til Grønlands og róði út við smábátum við Óla Fossaberg sum skipara og Magnus Frederik (Maggi) úr Kvívík sum bátsformanni. Í 1959 fór hann við "Skarvanesi" við Mariusi Joensen sum skipara.

Í 1960 fór hann við Norðmonnum, fyrst við gamla "Granit". Í 1962 var hann fimm ísfiskatúrar við "Onnu T". Í 1963 fór hann við "Eldoy" og í 1965 við "Knut Grønnevet" og í 1967 fór hann við nýggja "Granit". Somu skiparar vóru við øllum Norðmonnunum. Í 1968 fór hann við "Silver Spray" við Magnusi Olsen sum skipara. Í 1969 var hann við "Vesturvík", eisini við Magnusi Olsen sum skipara.

Hann koyrdi dumpara hjá Landinum frá 1971-74, tá hann fór við "Thomas Nygaard". Í 1976 fór hann við "Vaðhorn" og var eisini í Polen eftir skipinum. Eftir tað sigldi hann sum kokkur, til hann legðist heima í 1986 og fór at arbeiða við aling.

Heðin er giftur við Elsebeth M. Hansen úr Kollafirði, tey eiga trý børn: Gudny, sum er gift til Runavíkar, Oddny og Jens Marni, sum búgva í Kollafirði.

Heðini verður ynskt hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Hann er ikki heima føðingardagin.

# Geoffery Bannister framsýning í Smiðjuni

Mikudagin 9. juni 2004 kl. 16.30 verður fernisering í Smiðjuni í Lítluvík í sambandi við at Geoffery Bannister, arkitektur, letur upp eina listaframsýning.

Geoffery Bannister er 81 ára gamal og búsitandi í Írlandi. Hann vitjaði sum unglingi skyldfólk í Føroyum, og eru málningar hansara frá hesum tíðarskeiði.

Mamma hansara, Estrid Bannister, var kenda "Barbara" sum Jørgen Frants Jacobsen hevur fingið íblástur frá til søguna um



*Geoffery Bannister*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Barbaru, sum varð víst á filmi fyri fáum árum síðan.

Geoffery Bannister kom úr Írlandi til Føroya við leigaðum flogfari mánadagin við 25 málningum sum hann skal sýna fram.

Talan er um eina sølframsýning, har tey flestu myndaevnini eru úr Føroyum.

Framsýningin er opin allar dagar frá kl. 16-20, Seinasti framsýningardagur verður 16. juni 2004.

Postverk Føroya, Frímerkjadeildin:

# Smyrilin vann 2. pláss

**Á stórari frímerkjaframsýning í Essen í Týskalandi hevur Postverk Føroya vunnið annað pláss í kappingini hjá Deutsche Briefmarken Revue:**

*„Wahl der schönsten Briefmarke Europas 2002"*

Talan er um útveljingin av vakrasta frímerki í Europa í 2002. Soljóðandi pressuskriv kom úr Týskalandi í vikuskiftinum:

Týskaland fyrst, beint undan Føroyum, og á triðja plássi Svøríki, soleiðis bleiv endaspurturin á kappingini „Vakrasta í Europa"

Umleið 30.000 savnarar góvu sína atkvøðu og 28 prosent atkvøddu fyri Týskalandi, 26 prosent fyri Føroyum og 12 prosent fyri Svøríki, síðani komu lond sum Slovenia, Áland og Luxembourg.

Føroyar vunnu 2. pláss fyri „smyrilin", sum Edward Fuglø so meistarliga hevur teknað.

Øll frímerkini sum luttóku í kappingini vóru frá 2002

Sigast kann, at Føroyar eru í góðum vertskapi, tí lond sum Týskaland og Svøríki eru í heimsflokki, tá tað snýr seg um dygd á frímerkjunum.




*Føroyar vunnu 2. pláss fyri „smyrilin", sum Edward Fuglø so meistarliga hevur teknað*




*Korinta Jarnfoss (t.h), frá Frímerkjdeildini, saman við týsku og svensku umboðunum. Týskland bleiv nr. 1, Føroyar nr. 2, og Svøríki nr. 3. Øll frímerkini sum luttóku í kappingini vóru frá 2002*
*Mynd: Postverk Føroya*


# Móttøka

Í samband við at vit eru flutt í nýggju
høli okkara í Jónas Broncksgøtu 16,
verður móttøka fríggjadagin 11. juni 2004
millum kl. 15.00 og 17.00

**Sp/f Grannskoðaravirkið**
**Hermund Jacobsen**
**skrásettur grannskoðari**
**boks 16 - 110 Tórshavn**
**teldupostur: hermund@hermund.fo**

SP/F GRANNSKOÐARAVIRKIÐ
HERMUND JACOBSEN
SKRÁSETTIR GRANNSKOÐARAR


**Minningarorð hjá Erik Hoffmeyer, fyrrverandi danskur tjóðbankastjóri, professari, og dr. polit. um Richard Mikkelsen, fyrrverandi tjóðbankastjóra, í Jyllandsposten 4. juni og í Politikken 7. juni 2004**

# Mindeord

## Mindeord om fhv. nationalbankdirektør Richard Mikkelsen



Richard Mikkelsen var min nærmeste medarbejder indtil sin afgang i 1990. Hann var ikke mindst ankermand i det virvar af reguleringer på penge- og kapitalmarkedet, hvor der – ofte efter politisk ønske – blev gjort forsøg på at dæmme op for et efterspørgselspres, som den svage betalingsbalance ikke kunne bære.

Danmark var ikke alene om sådanne reguleringer, men vi havde meget i klemme.

Mikkelsen var 100 procent til at stole på – herunder også at reglerne var nøje gennemtænkte og ikke for bureaukratiske. Han var ligeledes en stor støtte i det øgede internationale samarbejde, hvor hovedvægten efterhånden lå på det europæiske plan.

Hans indsats var præget af en sund nøgterhed, men også af en befriende sans for humor.

## Dagurin

**9. juni. Primus**, deyður umleið ár 300. Hann var rómverji. Hann og bróðir hansara Felicianus vórðu illa píndir og tiknir av døgum. Primus merkir *tann fyrsti.*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýndu samkenslu, tá ið kæri maður, pápi og abbi okkara

**Jónathan Andreasen**
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á deild M. á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og til tykkum á B8 og B6.

Tøkk til prest og kirkjutænarar, sangarar og berarar. Tøkk til tykkum, sum vitjaðu inn á gólvið, og til tykkum, sum ringdu til okkara.

Tøkk fyri blómur og kransar og tykkum, sum sendu gávur til Føroya Felag móti Krabbameini.

Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum, og til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Jóhanna, Oda, Jastrid, Eydna og Karin**